Sosialurin
# VARPIÐ
FRÍGGJADAGUR 27. februar 2004



**UEFA Cup: FC Barcelona-Brøndby**
Avgerandi seinni dysturin í Barcelona. Hetta er samstundis fyrstu ferð venjarin hjá Brøndby, Michael Laudrup, alment er á Camp Nou, síðan hann í síni tíð var ein av bestu Barcelona-leikarunum. Hesuferð skal hann tó standa á síðulinjuni.
**Mikudagin kl. 19.30**



**Windtalkers**
Krígsfilmur eftir John Woo, grundaður á veruligar hendingar. Nicolas Cage og Christian Slater er lívverjar hjá Navajo-indianarunum, sum amerikanskir hermenn nýttu til at senda kotaði boð undir 2. Veraldarbardaga.
**Leygardagin kl. 19.00**

SvF sendir beinleiðis frá ársins størstu filmshending: Handanini av Oscar virðislønunum. Byrjað verður við eini søguligari sending um Oscar gjøgnum tíðirnar - og síðani verður sett yvir til DR 2, har ein upptakt verður áðrenn beinleiðis sendingina frá handanini.
**Sunnudagin kl. 21.50**

Fleiri rásir - einki roks

**Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið**